

STARVSLÝSING

# Vilt tú stýra ferðslutrygdini?

Ráðið fyri Ferðslutrygd søkir nýggjan stjóra at standa á odda fyri arbeiðinum hjá felagnum at skapa trygga ferðslu við støði í Nullhugsjónini.

**Umframt at hava**

- leiðaraevni
- samskiftisevni og
- samskipanarevni

**skal stjórin eisini**

- vera eldhugað/ur
- vera kreativ/ur
- geva seg av fullum huga til endamálið
- eiga evni til at gera hugskot til veruleika, og
- hava tev fyri eggjandi og upplýsandi átøkum

**Uppgávurnar hjá stjóranum eru m.a.**

- at vera íverksetari
- at vera verkætlanarleiðari, og leiða fleiri verkætlanir samstundis
- at savna og uppbyggja fakliga vitan til virkna nýtslu í samfelagnum
- at samstarva tætt við stuðlar, ið eisini eru tættir samstarvsfelagar hjá felagnum
- at samstarva við myndugleikar, skúlar, stovnar, feløg, fyritøkur og einstaklingar um at virka fyri at betra um ferðslutrygdina í Føroyum
- at luttaka í norðurlendskum ferðslutrygdarsamstarvi
- dagligt samskifti við ferðslubrúkarar
- at vera klár/ur at persónliga trína fram í almenna rúminum og umboða sjónarmiðini hjá RFF

**Førleikar**

Tú hevur hóskandi útbúgving, har leiðsla og samskifti eru nakrir av hornasteinunum.

Vit vænta, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, miðvíst, og at fyrihalda og tillaga teg til broytingar í starvinum. Tú kennir føroyska samfelagið væl, og hevur skil fyri hvat rørist millum fólk. Tú dugir væl við fólki og at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum.

**Løn**

Sambært nærri avtalu.

**Umsókn**

Hevur tú spurningar í samband við starvið, kanst tú seta teg í samband við starvsnevndarformannin, Kára Thorsteinsson (kt@rff.fo).

Umsóknarfreist er mánadagin 2. mai 2011. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til:**

Ráðið fyri Ferðslutrygd
Att: Starvsnevndin
Tungugøta 4 - Miðhæddin
Postsmoga 3209
110 Tórshavn

ella sum teldupostur til :rff@rff.fo

rff Ráðið fyri Ferðslutrygd

**Tungugøta 4 · Tórshavn · Tel 310 204 · www.rff.fo**




Í ár hava limirnir í Starvsmannafelagnum staðið saman og virkað í fólksins tænastu í fimmti ár.
Kvinnur og menn. Tey eru skansar í gerandisdegnum og hjálpa til at bera samfelagið fram á mál.
Hetta er tað, tey gera. Fleiri enn 2.000 í tali. Tey gera munin.

... í fólksins tænastu